

Mynd: BG Group

# Oljuprísurin hækkar spakuliga

**Jógvan Hugo Gardar**

21.11.2015 - 12:32

Oljan.fo

Oljuprísurin hækkar spakuliga aftur. Vikan sum fór bendi á at oljuprísurin lækkaði skjótt móti einum metlágum prísi, men seinnapartin fríggjadagin kom vend í.

Prísurin tók at hækka aftur aftaná at Baker Hughes um sekstíðina fríggjakvøldið kom við sínum fesku tølum sum vísa hvussu nógvir boripallar eru í arbeiði í USA.

Yvirlitið vísir at talið á oljuboripallum eru tíggju færri enn fyri viku síðani. Í gjár vóru 564 boripallar virknir. Talið á gassboripallum er tað sama, til saman 757.

Talan er um at heilir 1172 boripallar færri nú enn fyri einum ári síðani. Um hálvgum áttatíðina í gjárkvøldið var prísurin á Norðsjóvaroljuni Brent líka omanfyri 45 dollarar fyri

fatið. Í dag er hann lækkaður aftur til 44,68 dollarar fyri fatið. Talan er um ein prísvøkstur síðani í gjáramorgunin við knøppum tveimum prosentum.

Amerikanska lættoljan WTI kostar í dag 41,90 dollarar fyri fatið.

Norski oljugreinarin Torbjørn Kjus hjá DNB, sigur við Bloomberg News at høvuðsorsøkin til at ov nógv olja er á goymsku á heimsmarknaðinum er at USA og Irak hava framleitt meir enn roknað varð við. Sambært Bloomberg framleiða USA og Irak tilsamans 4,88 milliardir føt um árið, og hetta er 60 prosent meir enn londini framleiddu í 2012.

Hugurin at seta pengar í oljumenning er lítil í løtuni, og kríggi hjá Irak móti Isil eru tvær orsøkir sum gera at oljuframleiðslan nú kemur at minka, rokna serfrøðingar við, sambært Bloomberg.

Altjóða orkuráðið, IEA, roknar við at USA í 2016 kemur at framleiða 600.000 føt færri um dagin, samanborið við í ár. Framleiðslan hjá Irak kemur at liggja á umleið sama støði sum í ár.